# Lekar settu ferðina niður

**Arbeiðið at gera Norðoyatunnilin er ikki longur framman-fyri tíðarætlanina, tí tað gekk so seint í eina tíð. Nógvir lekar seinkaðu arbeiðnum Klaksvíksmegin, men nú gongur betur aftur**

TUNNIL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

November mánaði var ein strævin mánaði í Norðoyatunnlinum, men nú gongur aftur frægari.

Arbeiðið Klaksvíksmegin gekk sera seint í eina tíð, tí tað vóru so nógvir lekar, og tíðin, sum arbeiðið var frammanfyri tíðarætlanina, varð etin upp eftir fáum vikum.

– Vit vóru eitt skifti tríggjar vikur frammanfyri tíðarætlanina, men nú fylgja vit aftur tíðarætlanini. Tað kom væl við, at vit vóru frammanfyri tíðina, tá vit rendu okkum í lekarnar, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunnlinum.

Seinasta uppgerðin hjá Norðoyatunnlinum vísir, at arbeiðið er komið umleið 1500 metrar Klaksvíksmegin og góðar 2200 metrar Leirvíksmegin. Samanlagt eru arbeiðsfólkini og maskinur komnar ígjøgnum eini 60 prosent av tunnlinum.



*– Vit vóru eitt skifti tríggjar vikur frammanfyri tíðarætlanina, men nú fylgja vit aftur tíðarætlanini. Tað kom væl við, at vit vóru frammanfyri tíðina, tá vit rendu okkum í lekarnar, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunnlinum*

### Høvdu roknað við trupulleikum

Tað var roknað við, at tað kundu koma lekar undir Háfjalli, og so varð eisini. Tað gekk í grundin betur enn væntað í eina tíð, men so kom vatnið.

– Borðoyarmegin fara vit niður ígjøgnum fláirnar, og tí vistu vit, at tað kundi verða ótætt í støðum. Harafturat er vatntrýstið undir Háfjalli so stórt, at lekarnir gerast stórir, og tað krevur nógv at tetta teir, sigur Dávur Reinert Hansen.

Leirvíksmegin hava tað ikki verið líknandi lekar, og tað kemst av, at har fer tunnilin við fláini niðureftir. Klaksvíksmegin ganga fláirnar øvugtan veg av boringini, og tí er tað meira óvíst við arbeiðnum har.

### Hava sproytað alt

Tá ið lekarnir gerast so umfatandi, sum teir vóru í Norðoyatunnlinum einu tíðina, verður nógv sement brúkt til at tetta við. Sementið verður sprænt inn sprekkurnar, og nýtslan av hesum sementi hevur verið so stór, at tey 1100 tonsini, sum vóru við í avtaluni at gera tunnilin, eru brúkt.

Avtalan er tann, at byggiharrin skal gjalda fyri tey fyrstu 1100 tonsini, og verður nýtslan av sementi meira enn tað, skal p/f Norðoyatunnilin gjalda helvtina av kostnaðinum fyri restina.

– Vit hava brúkt øll tey 1100 tonsini, og vit hava sett á meira, men tað er lítið brúkt út yvir tað, sigur Dávur Reinert Hansen.

### Vóna at sleppa undan

Hvørja ferð eitt tons verður brúkt av sementinum, kostar tað millum trý og fýra túsund krónur.

– Hvussu stórur eykakostnaðurin av hesum verður, veldst nógv um nøgdirnar, sum vit koma at brúka. Vit hava fyrireikað okkum til, at tað kunnu koma lekar aftur, men vit vóna at sleppa undan fleiri stórum lekum, sigur Dávur Reinert Hansen.

– Nú vóna vit, at arbeiðið fer at ganga væl í eina tíð, so at vit kunnu vinna fram um tíðarætlanina aftur. Jarðfrøðisliga skuldu vit nú gjarna nærkast einum parti, sum skuldi verið betur at arbeitt í, sigur hann.

### Jólafrí

Arbeiðið við Norðoyatunnlinum heldur fram í eina slaka viku afturat, og tann 22. desember verður farið í jólafrí.

Einki arbeiðið verður millum jólanna, men mánadagin 3. januar 2005 verður lagt til brots aftur.

Æltanin er framvegis, at Norðoyatunnilin skal verða skotin ígjøgnum næsta summar – helst í juni mánaði næsta ár.å

## Norðoya-tunnilin

Arbeiðið at gera Norðoyatunnilin byrjaði í Leirvík í desember mánaði 2003. Í apríl 2004 var farið undir arbeiðið Klaksvíksmegin.

Tunnlin verður 6,3 kilometrar til longdar, og góðir 3,7 kilometrar eru nú borðaðir. Ætlanin er, at tunnilin skal verða skotin ígjøgnum í juni mánaði 2005. Koyrandi skal verða undir Leirvíksfjørð miðskeiðis í 2006.

Norðoyatunnilin er mettur at kosta umleið 355 milliónir krónur. Landið rindar 235 milliónir við partapeningi, og restin skal fíggjast við nýtslugjaldi.

P/F Norðoyatunnilin eigur og rekur tunnilin, til hann er goldin, Tá fellur hann aftur til landið.

## Einki at finnast at í starvssetan

Løgtingsins Umboðsmaður hevur viðgjørt eina klagu um starvssetan av yvirportøri á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, men hevur einki at finnast at.

Í klaguni var millum annað ført fram, at eingin verulig setanarnevnd hevði viðgjørt umsóknirnar, at einki skrivligt tilfar var frá hesari viðgerðini, at setanarnevndin ikki hevði havt fakligan førleika til at meta um umsøkjararnar, at ongar starvssamrøður høvdu verið við umsøkjararnar, at grundgevingarnar til vrakaðu umsøkjararnar ikki vóru nøktandi, og at setanin átti at ganga umaftur.

Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at ein setanarbólkur hevði viðgjørt málið. Hann helt ikki grundarlag vera fyri at finnast at mannagongdini hjá setanarbólkinum og dugdi ikki at síggja, at avgerðin bygdi á ósaklig fyrilit.

Umboðsmaðurin hevði tí ongar viðmerkingar til sjálva avgerðina, eins og hann ongar viðmerkingar hevði til, at setanarsamrøður bert høvdu verið við setta umsøkjaran.

Umboðsmaðurin staðfesti, at grundgevingin, sum var givin vrakaðu umsøkjarunum í fyrra umfari, ikki var nøktandi. Av tí, at nýggj skriv við nøktandi grundgevingum vóru latin hesum umsøkjarunum, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við hendan spurningin.

Umboðsmaðurin varnaðist, at hóast vrakaðu umsøkjararnir høvdu biðið Klaksvíkar Sjúkrahús um innlit í øll skjølini, høvdu teir ikki fingið innlit í upplýsingar í nøkrum innanhýsis skjølum, sum viðvíktu teimum. Umboðsmaðurin valdi at taka hendan spurningin upp til viðgerðar, og hann gav Klaksvíkar Sjúkrahúsi eina átalu fyri handfaringina av hesari umbønini um innlit.

# Klaksvíkar býráð skal nú skipa seg

**Mánakvøldið fer nývalda býráðið í Klaksvíkar kommunu at skipa seg. Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin skulu stýra kommununi næstu fýra árini**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mánakvøldið var avtalan millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin um samstarv í Klaksvíkar býráði næstu fýra árini staðfest.

Fáar dagar eftir valið funnu hesir flokkarnir saman, men teir hava ongantíð gjørt nakra endaliga avtalu. Samstundis hava flokkarnir, sum endaðu uttanfyri, roynt av øllum alvi at sloppið upp í part, men tað hevur ikki eydnast.

Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin halda fast um samstarvið teirra millum, og flokkarnir eru ikki sinnaðir at gera nakað breitt samstarv í býráðnum, soleiðis sum flokkarnir í minnilutanum hava mælt til.

### Skipa seg mánakvøldið

Nýggja býráðið skal formliga skipa seg á fundi mánakvøldið, og tá skulu tær ymsu nevndirnar eisini veljast.

Enn eru nøvnini á formonnum og nevndarlimum ikki komin fram alment, men tað er greitt, at Fólkaflokkurin skal hava formannin í fýra nevndum – Havnanevndini, Teknisku nevnd, Byggi- og býarskipanarnevndini og Mentanarnevndini.

Tjóðveldisflokkurin fær borgarstjóran og formenninar í trimum nevndum – Fíggjarnevndini, Sosialu nevnd og Heilsunevndini.